## Feløg fingu gávu

Felagskommunan í Vágum hevur heiðrað tvey av feløgunum í oynni. Vága Dansifelag varð stovnað 1. desember í 1976 og hevur sostatt virkað í 30 ár. Í tí sambandi hevur felagið fingið 15.000 krónur frá Felagskommununi. Eitt annað felag í Vágum, sum fyllir runt, er Vága Pensjonistafelag. Felagið hevur 25 ár á baki og hevur í tí sambandi fingið 25.000 kónur frá Felagskommununi, skrivar heimasíðan hjá Sørvágs kommunu.

## Sovnaði á brúnni

Í gjár sigldi norska farmaskipið „Tananger“ á land í Bjoafjørðinum í Hordalandi. Løgreglan varð boðsend, og avhoyringarnar avdúkaðu, at skipið var farið á land, tí stýrimaðurin, sum hevði vakt á brúnni, var sovnaður. Eingin av teimum ellivu monnunum, sum vóru við, fekk mein av tilburðinum, og skipið fekk heldur ikki stórvegis skaða. „Tananger“ var á veg úr Bergen til Stavanger, tá óhappið hendi.



árs

# ørumerkið hjá FSN

ein áhugaverdur partur av frágreiðingini.

Her vísti hann eitt nú á, hvussu Føroya Skipara-og Navigatørfelag og onnur fakfeløg kundu skipað seg betri, tá ið samráðingar eru við arbeiðsgevararnar.

– Áðrenn samráðingar byrja, kunngera arbeiðsgevarar, hvør lønarkarmurin er, og hesin er ikki til at vika, so leingi sum fakfeløgini standa so spjadd. Samráðingarnar bera mest brá av, at tey einstøku feløgini royna at tiltuska sær okkurt smávegis fram um hini feløgini. At tað verður góðtikið, at annar parturin einsamallur ásetir lønarkarmin, sigur nóg mikið um støðuna.

Eyðstein vísti á, at mong viðurskifti eru eins fyri siglandi fólkið, eitt nú starvssetan, uppsøgn, sosial viðurskifti, eftirløn, trygging, skattur og ALS.

– Fakfeløgini, sum umboða sjófólkið, eiga at byrja eitt skipað samstarv um hesi felags mál, og endamálið við hesum eigur at verða at fáa meira tyngd í tey sjónarmið, sum verða førd fram – og at ein ávísur figgjarligur fyrimunur eisini skuldi fingist á henda hátt.

### Málsetningar

Eyðstein Djurhuus helt, at nevndararbeiði í FSN hevur verið ov illa samskipað, og at hann sum formaður noyðist at taka ábyrgdina av hesum.

– Orsøkin er, sum eg áður havi nevnt, at eg ikki veit við vissu, nær eg eri heima, og tá er sera trupult at fyrireika nakað sum helst, sum hann tók til.

– Tann nevnd, sum verður vald á aðalfundinum nú, eigur at gera eina arbeiðsætlan og málsetningar fyri komandi árið.

Hann helt, at FSN á ein hóskandi hátt eigur at kunna limirnar um felagsarbeiði, og felagið eigur eisini at føra síni sjónarmið fram í málum, sum eru frammi í tíðini.

– Eitt uppskot kundi verið, at felagið við jøvnum millumbili sendir út eitt tíðindabræv, segði Eyðstein.

### At tillaga seg

– Ofta verður sagt, at tað er tann sterkasti, sum yvirlivir, men hetta er neyvan rætt. Tann, sum dugir at laga seg til broyttar umstøður, er tann, sum yvirlivir.

Formaðurin helt, at framtíðin fer at krevja, at FSN tillagar seg til broyttar umstøður.

- Tað er áræði og fyritaksemi, sum hevur eyðkent føroyskar skiparar og stýrimenn, og hetta áræði vil Føroya Skipara-og Navigatørfelag eisini gera til sítt vørumerki, segði Eyðstein Djurhuus á aðalfundi felagsins.



*Seinasta ár var óføra gott hjá leirvíkstrolarunum - og øll útlit eru til, at positiva gongdin fer at halda fram*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Polarhav og Stjørnan óføra sølu í Danmark

**Mikumorgunin landaðu og seldu partrolararnir Polarhav og Stjørnan 210 tons í Hanstholm fyri umleið 2,4 miljónir krónur netto. Tað er sølufelagið Fo-Fish í Runavík, sum fyriskipaði søluna hjá skipunum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leirvíkstrolararnir, Polarhav og Stjørnan, høvdu eitt sera gott ár í fjør, og fyrsti túrurin í ár gevur góðar vónir um, at enn eitt gott ár er í væntu.

Skipini lógu um jólahøgtíðina og byrjaðu at fiska aftur 28. desember.

Fiskiskapurin hevur verið góður, og í mikumorgunin landaðu tey umleið 210 tons í Hanstholm.

Sølan hesaferð telist helst millum tær allar bestu og størstu, sum føroysk upsaskip nakrantíð hava gjørt eftir einum túri.

Eini 200 tons av veiðini hjá Polarhavi og Stjørnuni var upsi, sum skipini fingu stívliga 10 krónur fyri í miðal fyri kilo. Restin av veiðini – ella eini 10 tons – var onnur fiskasløg.

Samlaða sølan liggur um 2,4 miljónir krónur netto.

Tað er sølufelagið Fo-Fish í Runavík, sum hevur fyriskipað søluna hjá Polarhavi og Stjørnuni.

Sjey mans eru umborð á hvørjum skipi í senn.

# Boðasteinur og búrfiskur

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í 1998 landaði trolarin Boðasteinur úr Fuglafirði 240-250 tons av búrfiski á Tvøroyri, sum teir seldu fyri umleið 3,5 miljónir krónur. Tað er umleið 1 miljón krónur meira, enn Stjørnan og Polarhav seldu fyri í gjáramorgunin.

Hetta var ein av mongum minniligum túrum hjá Boðasteini og teir, sum høvdu við skipið at gera, minnast ikki minst hendan túrin – og hesa sølu – sum var hon í gjár.



*Boðasteinur gjørdi fleiri góðar túrar á búrfiski*

Boðasteinur fiskaði í fýra dagar, men túrurin vardi í umleið 12 dagar við sigling suður móti Asorunum og heimaftur.